# TILTØK

**Gudstænastur Hóskvøldið 25. august**
*Sambýlið við Bøgøtu:* kl. 19.30 Hans Eiler Hammer

**Leygarkvøldið 27. august**
*Fríðrikskirkjan:* kl. 20.00 Ungdómsgudstænasta, Martin R. Jacobsen

**14. sunnudag e. Trinitatis**
*Vesturkirkjan:* kl. 11.00, Bergur D.Joensen
*Argja kirkja:* kl. 11.00, Heri Joensen
*Kirkjubøar kirkja:* kl. 12.15, Heri Joensen, altarg.
*Sjóvar kirkja:* kl. 11.00, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Norðskála:* kl. 10.40 Skriftamál, kl. 11.00 Messa, Emil Olsen
*Gøta:* kl. 11.00, Martin R. Jacobsen
*Bøur:* kl. 11.00, altarg., Inga Poulsen Dam
*Mykines:* kl. 11.00, altarg., David Johannesen
*Vestmanna:* kl. 11.00, Marjun Bæk
*Haldarsvík:* kl. 11.00, altarg., Mogens Tilsted Christensen
*Fuglafjørður:* Familjugudstænasta, Uni Næs. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan
*Húsa kirkja:* kl. 11.00, altarg., Hans Eiler Hammer. Nýggjur messuakul verður vígdur og tikin í nýtslu undir gudstænastuni
*Christianskirkjan:* kl. 11.00, Lestur
*Tvøroyri:* kl. 11.00, Barna- og familjugudstænasta, Jónsvein Bech

**Fríkirkjan Oasan**
*Kirkjustræti 4*
Hóskvøldið kl 20.00 Ungdómsmøti, v/Jóhan P. Johannesen.
Fríggjadagin kl 21.00 Gospelkonsert, luttøka: Finnur Hansen, Proclamin og United Voices. Drekkamunnur verður aftaná.
Leygardagin kl 15.00 Vígsluguðstænasta v/ Jóna Johannesen og Jógvan av Lakjuni, sangur: Tórbjørn & Annika, Sigrið o.o. Dansibólkurin Salti hevur framførslu. Ábit verður aftaná. Kirkjan verður víst fram kl 17.00 – 19.00, kl 19.30 Evangeliskt møti v/Eivind Frøen, sangur: Mans-trio`in úr Soli Deo Gloria.
Sunnudagin kl 11.00 Guðstænasta v/Fridrik Schram, Sangur: Ester, Jannet o.o., kl 14.00 Sunnudagsskúli, Absalon Áargarð v/fam. luttekur, kl 18.00 Evangeliskt møti v/ Eivind Frøen, sangur: Tórbjørn & Annika, Sigrið o.o. Nátturði verður aftaná.
Mánadagin kl 17.15 til 18.00 venur barnakórið, 1. flokkur og eldri, kl. 20.00 bønarmøti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Frá Ebenezer**
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti, David og Anna Rodda vísa myndir og greiða frá arbeiðinum í Senegal.
www.ebenezer.fo

**Havnar KFUK-skótar**
Vit byrjar aftur í viku 35: Spírar 6 ár og 1. fl. og Títlingar 2.-5. flokk møta mikudag kl. 16.30-18.00 og Skótar 5.-8. flokk og Ungdomsskótar møta mánakvøldið kl. 19.00-21.00.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudag kl. 11.00 og 18.00 Møti. Sunnudagsskúli kl. 14.00.
www.frelsunarherurin.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin kl. 10.30 á Familjumøtinum talar David Rodda, kl. 11.30 Samvera við drekka, kl. 12.00 Tilbiðjanarmøti. Sunnudagsskúlin er kl. 12.00. Barnaansing er undir báðum møtunum.
www.livdin.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00 Hámessa v/ Wolf Schmidt, prestur, í Mariukirkjuni. (Talvan gongur fyri hjálparfelagsskápin Caritas). Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin 28. august kl. 14.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Síðsta sunnudag í hvørjum mánaði verður tilbiðjan av tí Heilaga Sakramentinum í Mariukirkjuni frá kl. 15.00 til 18.00. Serliga vilja vit biðja fyri okkara meinigheit og tí henni tørvar. Øll eru vælkomin.
Mánakvøldið 29. august kl. 19.30 verður fyrilestur við Lida van Diij og Joke Bos, limir í Focalare felagsskapinum í Mariukirkjuni. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.katolsk.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 6.00 Morgunbøn, kl. 17.00 Bøn fyri samkomuni.
Í morgin kl. 6.00 Morgunbøn. Einki ungdómsmøti vegna konsert í Oasuni.
Leygardagin kl. 17.00 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti v/ Einar Joensen, kl. 11.50 ABC, evnið: »Tær 5 tænasturnar« 2. partur v/ Ólavi Jacobsen – undir taluni er summarskúlin, kl. 22.00 Útifundur.
www.filadelfia.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti við Per Aagaard Hansen úr Danmark og Ole Kristian Kjenes úr Noregi.
Týskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. www.gospel.fo

**Meinigheitshúsið**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti v/ Hera Tróndheim.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnanasing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni. Kl. 12.00 Sunnudagsskúli og Møti. Poul Færø úr Klaksvík talar. www.hebron.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Kollafirði**
Ungdómsvikuskiftismøtir í Missiónshúsinum í Kollafirði fríggjakvøldið kl. 19.30 við luttøku úr Miðvági.
Leygarkvøldið kl. 19.30 við luttøku úr Fuglafirði.
Sunnukvøldið kl. 18.00 við luttøku av Glyvrum. Okkurt verður til matna aftaná, og øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og Morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Høgna á Reynatrøð.
Sunnudagin morgunmøti kl. 11.0 við Biker-meet. Barnamøti kl. 11.00. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Filadelfia, Gøta**
Á fundinum hóskvøldið kl. 20.00 greiða hjúnini Anna og David Rodda frá trúboðanarverkinum í Senegal. Samkomurnar Filadelfia í Gøtu, Hebron í Leirvík og Siloa í Gøtu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti við André Matras. Evni: Tungutala.
Sunnudagin kl. 11.00 Møti við Eivinn Bringsberg. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti við Bibliuskúlanum á Børkop í DK, har tey luttaka við sangi, talu og drama. Øll eru vælkomin.
Fríggjakvøldiðkl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Christian Frírik Olsen. Kl. 21.00 Ungdómsmøti.
Mánakvøldið kl. 21.00 kemur KBBB saman í KFUM og K.
Týskvøldið kl. 21.30 og hósdagin kl. 16.00 Bønarløta.
Sunnukvøldið kl. 21.00 Ungdómsmøti við Kinatoymi. Øll eru vælkomin. www.fuff.fo

## Brúdleyp

Leygardagin 27. august kl. 13.00 giftast í Býráðssalinum Rúna Mortensen og Nemus Napoleon Djurhuus. Vælkomst verður í Sjónleikarahúsinum frá kl. 14.00 til kl. 18.00.

Leygardagin 27. august giftast í Skagen kirkju Karina Vilhelm úr Vági og Erik Andersen úr Skagen. Adr.: Brunebanke 13, DK-9990 Skagen.

Leygardagin 27. august kl. 14.00 giftast í Kvívíkar kirkju, Fríðunn Jacobsen úr Leynum og Kári Jacobsen úr Søldarfirði. Brúdleypið verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 27. august kl. 11.00 giftast í Sandavágs kirkju, Anna Elisabeth Simonsen, Sandavágur og Johnny Petersen, Hósvík. Døgurði verður fyri innboðin. Vælkomst verður hjá Belindu og Suna Johansen, Traðarvegur 28, Sandavág-ur, frá kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 3. september kl. 14.00 giftast á Sýslumansskrivstovuni í Miðvági René Wiberg Joensen, Miðvágur og Stacey Smith, Chilliwack, Canada. Døgurði verður fyri innbodnum. Opið hús verður í Missiónshúsinum í Miðvági frá kl. 20.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 25. august á tlf. 333776, 251876 ella á e-post: reneandstacey@hotmail.com

Leygardagin 10. september giftast í Sjóvar kirkju, Tinna Johannessen, av Strondum og Thorleif Dahl, av Oyri. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 449929, 447129, 422129, áðrenn 3. september.

Leygardagin 17. september kl. 12.30 giftast í Kelduni í Skálafirði Oda Sonja Frederiksberg, Strendur og Signar Martin Høj, Strendur. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 448328 ella 448327 innan 1. september.

## Gullbrúdleyp

Leygardagin 3. september kunnu hjúnini Elsa og Jógvan Petersen, Kollafjørður, halda gullbrúdleyp. Tey, ið vilja gleða parið, eru hjartaliga vælkomin í Missiónshúsið í Kollafirði millum kl. 10.00 og 14.00.

## 75 ár

Fríggjadagin 26. august verður Ísak Bjarnaskor á Viðareiði 75 ár. Dagurin verður hildin hjá soninum Kristian. Øll eru hjartaliga vælkomin.

# UTTAN ÚR HEIMI

## Fólkatalið veksur

Fólkatalið í heiminum veksur støðugt, og vøksturin fer at standa við í fleiri áratíggju afturat.

Granskingarstovnurin Population Reference Bureau sigur í síni seinastu frágreiðing, at fólkatalið fer at veksa skjótast í menningarlondunum, og at tað fer at avmarka møguleikarnar hjá teimum ríku londunum at hjálpa teimum fátæku. Harafturat vísir tað seg, at fólkatalið veksur serliga skjótt í júst teimum fátæku londunum, og at næstan 99 prosent av vøkstrinum stavar frá teimum londunum.

Carl Haub hjá Population Reference Bureau sigur við AP, at fáa kvinnurnar í Vesturheiminum ikki fleiri børn í meðal enn nú, kann tað forða búskaparvøkstrinum í hesum londunum. Hann leggur afturat, at londini í Vesturheiminum hava verið tey ídnastu at lata menningarhjálp, og tí er tað ørkymlandi, um tað lítla barnatalið skal tálma búskapinum har, samstundis sum fólkatalið í teimum fátæku londunum veksur skjótt.

## Ísurin hvørvur

Amerikanskir granskarar ávara nú um, at ísurin í økinum kring Norðpólin minkar skjótari enn higartil hildið.

Í umleið eina millión ár hevur økið kring Norðpólin ligið undir í ísi, men granskararnir siga nú, at heldur verandi gongd fram, kann tað væl hugsast, at um hundrað ár verður eingin ísur í økinum um summarið. Jonathan T. Overpeck, granskari á lærda háskúlanum í Arizona, sigur við AP, at ísurin minkar skjótt longu nú, samstundis sum frostið er við at fara úr jørðini í stórum økjum í eitt nú Sibir. Hann sigur, at hetta fer at fáa álvarssamar avleiðingar, tí tá ísurin minkar, hækkar vatnsstøðan í høvunum, og tað kann leggja stór landaøki undir í sjógvi.

Tann amerikanska frágreiðingin kemur bara nakrar fáar dagar eftir, at umhvørvismálaráðharrar úr 23 londum hava verið í Grønlandi, har teir samdust um at biðja altjóða samfelagið alt fyri eitt fara undir tiltøk, sum kunnu tálma veðurlagsbroytingunum.

## Hann vil ikki eta

Russiski vinnulívsmaðurin Mikhail Khodorkovskij, sum herfyri varð dømdur langa fongsulsrevsing fyri skattasvik, er farin í hungursverkfall.

Khodorkovskij er misnøgdur við, at starvsfelagi hansara Platon Lebedev, sum eisini fekk fongsulsrevsing, er settur í kliva fyri seg sjálvan. Hann heldur uppá, at hetta er ikki gjørt fyri at revsa Lebedev, men er hevnd fyri blaðgreinar, sum Khodorkovskij hevur skrivað, og sum vóru sera atfinningarsamar ímóti myndugleikunum í Moskva.

– Í Kremla halda teir kanska, at hetta vísir teirra megi, men í veruleikanum vísir hetta, hvussu veikir og ræddir teir eru. Teir tora ikki í eitt politiskt orðaskifti við meg, so teir velja at seta starvsfelaga mín í kliva fyri seg sjálvan, sigur Khodorkovskij.

Í rættinum varð hann dømdur fyri skattasvik og fíggjarundandrátt, men nógvir russar halda, at í veruleikanum bleiv hann dømdur, tí hann hevði hjálpt andstøðuni við pengum.

## Vorðið sum brúðgómur

Fyri nøkrum døgum síðani hvarv ein 25 ára gamal maður í Guatemala sama dag, sum hann skuldi giftast við unnustu síni.

Nakrar tímar seinni kom hann afturíaftur, og hann greiddi nú frá, at hann hevði verið burturfluttur. Løgreglan fór alt fyri eitt undir at kanna málið, men rættiliga skjótt komu løgreglumenninir eftir, at maðurin segði ósatt, og at hann hevði als ikki verið burturfluttur.

– Vit varnaðust rættiliga skjótt, at hann segði ósatt. Sannleikin var, at hann rýmdi, tí hann vildi ikki giftast kortini. Neyðars brúður, sigur ein talsmaður fyri løgregluna við blaðið Estado de Sao Paulo. Hann leggur afturat, at maðurin verður ákærdur fyri at hava misbrúkt arbeiðsorku hjá løgregluni.